umhvørvisstovan

ELFELAGIÐ SEV
LANDAVEGUR 92
POSTBOX 319
110 TÓRSHAVN

Argir hin 16. juli 2013
Málsnr.: 13/00038-21
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Maria Gunnleivsdóttir Hansen

**Góðkenning av umhvørvisárinsmeting fyri vindmyllur í Húsahaga**

Umhvørvisstovan góðkennir hervið, sambært § 16, stk. 1 í elveitingarlógini[1], umhvørvisárinsmeting fyri 13 vindmyllum hjá Elfelagnum SEV í Húsahaga.

## 1. Endamál

Endamálið við umhvørvisárinsmetingini er at tryggja, at ávirkanin av verkætlanini á náttúru, umhvørvi og onnur viðurskifti er væl lýst, so at sleppast skal undan óvæntaðum avleiðingum av verkætlanini.

## 2. Umsókn og málsviðgerð

SEV sendi hin 9. januar 2013 Umhvørvisstovuni uppskot til umhvørvisárinsmeting til viðmerkingar. Endaliga árinsmeting varð latin Umhvørvisstovuni hin 22. apríl 2013. Henda fevnir tó ikki um seinna umfarið av lívfrøðiligum kanningum, sum Søvn Landsins/ Føroya Náttúrugripasavn, hevur gjørt á sumri 2013.

### 2.1 Umhvørvisárinsmetingin

Umhvørvisárinsmetingin viðgerð m.a. ampar av óljóði og skuggakasti í Húsahaga og nærhendis, ávirkan á djóra- og plantulívið á staðnum og hvussu vindmyllurnar síggjast í landslagnum. Eisini verða onnur viðurskifti lýst, so sum ávirkan á samskiftisútbúnað, trygdaratlit viðv. ferðslu o.a.

Gjørdar eru útrokningar av óljóði og skuggakasti frá vindmyllunum í økinum. Hesar vísa, at vindmyllurnar lúka markvirðini[2] fyri óljóð frá vindmyllum. Eisini vísa útrokningar, at markvirðið fyri skuggakast verur lokið.

[1] Løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni, við seinni broytingum.
[2] Markvirðini eru ásett í umhvørvisgóðkenning av vindmyllum í Húsahaga

Sambært umhvørvisárinsmetingini kann roknast við ávísari ávirkan á fuglalívið í nánd av vindmyllunum. Fuglurin, ið varð eygleiddur og mettur at eiga á økinum, er yvirhøvur fuglur, ið trívist á økjum við nógvum eyri, sandi, gróti og klettum. Svarthálsa, sum reiðrast í økinum, er tó eitt sjaldsamt fuglaslag í Føroyum, og serlig atlit mugu tí takast. SEV metir, at økt ferðsla í økinum, nú vegur verður lagdur inn á økið, kann verða órógvandi fyri fuglin, og mælir tí til, at varðveita bummin, ið stendur við innkoyringina, fyri at minka um ferðsluna.

Kortleggingin av vøkstri í økinum vísir, at størsti parturin eru vanlig sløg, sum eisini finnast aðrastaðni. Á einum lítlum øki í sunnara enda vaksa vínbláber, sum er eitt heldur sjáldsamt slag, og sum atlit mugu takast at.

## 2.2 Hoyring

Hin 24. apríl 2013 varð umhvørvisárinsmetingin send til almenna hoyring við lýsing í bløðunum og á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni. Eisini varð frágreiðingin send ávísum almennum stovnum. Freistin at koma við hoyringssvari var 5. juni 2013.

Umhvørvisstovan fekk ongi hoyringssvar, men setti nakar ískoytisspurningar, sum SEV hevur svarað nøktandi.

## 2.3 Friðingarmyndugleikarnir

Ætlanin at seta vindmyllur upp í Húsahaga og vegagerðin í tí sambandi varð við ávísum treytum góðkend av Náttúrufriðingarnevndini fyri Streymoyar sýslu hin 28. sept. 2012, og staðfest av Yvirfriðingarnevndini hin 21. juni 2013.

## 2.4 Serstøk byggisamtykt

Ein fyritreyt fyri at góðkenna umhvørvisárinsmetingina, er góðkend byggisamtykt fyri økið, sum loyvir vindmyllum

Serstøk byggisamtykt, ið loyvir vindmyllum á økinum, varð góðkend av Innlendismálaráðnum hin 27. juni 2013.

## 3. Avgerð

Umhvørvisstovan góðkennir umhvørvisárinsmetingina hjá SEV frá apríl 2013, tó við fyrivarni um nýggir týðandi upplýsingar koma fram í seinna kanningarumfari hjá Søvnum Landsins/-Føroya Náttúrugripasavnið.

Um nýggjar upplýsingar um týðandi náttúruvirði í økinum koma fram í endaligu frágreiðingini frá Søvnum Landsins/Náttúrugripasavninum, skal SEV taka serlig atlit fyri at verja hesi.

Treytin fyri hesari góðkenning er, at verkætlanin verður framd, sum greitt er frá í umhvørvisárinsmetingini, her undir:

- at vegurin til myllurnar verður stongdur fyri almennari ferðslu,
- at SEV skipar fyri, at øki har fuglur, serliga svarthálsa, reiðrast, og øki har vínbláber vaksa, ikki verða órógvað meðan arbeitt verður,
- at SEV setur tiltøk í verk fyri at verja tjarnir og vøtn í økinum.

Um fleiri vindmyllur skulu setast upp, skal nýggj umhvørvisárinsmeting gerast, sum skal góðkennast av Umhvørvisstovuni.

Henda góðkenning fevnir ikki um treytir um dálking og útlát, so sum óljóð og skuggakast. Treytir um útlát eru ásettar í umhvørvisgóðkenningini.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um neyðugt er við øðrum góðkenningum sambært aðrari lóggávu.

## 4. Eftirlit

Umhvørvisstovan hevur eftirlit við, at treytir í hesi góðkenning verða hildnar.

## 5. Kæra

Henda avgerð kann kærast til landsstýrismannin við innlendismálum. Møgulig kæra skal sendast til Umhvørvisstovuna, sum sendur kæruna til landsstýrismannin við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí at avgerðin er almannakunngjørd. Kærur skulu vera Umhvørvisstovuni í hendi í seinasta lagi 13. august 2013.

Suni Petersen, deildarleiðari

Maria Gunnleivsdóttir Hansen, málsviðgeri

**Avrit:** Jarðfeingi, Elveitingareftirlitið, Brekkutún 1, Postsmoga 3059, FO-110 Tórshavn
Tórshavnar kommuna, Postboks 32, FO-110 Tórshavn